SOSIALURIN 19
FRÍGGJADAG 17. MAI 2024
BÁTASTEVNA Í VESTMANNA 2024 19

# BJØRG Á RÓGVI ENDAÐI Á OVASTU RÓK Í VESTMANNA



Hon er ættað úr Funningi, men hevur búð í Vestmanna síðan 1985. Í nógv ár starvaðist hon sum bankafólk, men seinnu árini hevur hon verið sjálvtøðug vinnurekandi. Tá hon fyrstu ferð læt seg stilla upp á kommunuvalinum seinast, gjørdi hon eitt gott val, tó at hon tá var eitt óskrivað blað í politikki

VILMUND JACOBSEN

Bjørg á Rógvi er borgarstjóri í Vestmanna kommunu. Hon var varaborgarstjóri í byrjanini av hesum valskeiði, men gjørdist borgarstjóri, tá Pauli T. Petersen fór í farloyvi.

Hetta er hennara fyrsta skeið í politikki, og undan kommunuvalinum seinast hevði hon ongantíð áður verið uppstillað, hvørki til kommuval, ei heldur til løgtingsval.

– Tað er ikki tí, at eg ikki fleiri ferðir eri biðin um at stilla upp. Eg havi áður fingið áheitanir, men havi borið meg undan. Einaferð var eg uppstillað til val í skúlastýrinum, men eg visti ikki av hesum, fyrr enn eg sá tað í bløðunum, sigur hon brosandi.

## Næst flestar atkvøður

Á kommunuvalinum seinast læt Bjørg á Rógvi seg stilla upp. Hon gjørdi eitt gott val og varð vald í bygdarráðið við 140 atkvøðum, næst eftir Paula Trónd Petersen.

***– Hetta hevur verið ein lærurík tíð í bygdarráðnum, og tað hevur eisini verið spennandi og avbjóðandi á ovastu rók, nú hesin møguleikin beyðst, sigur borgarstjórin, Bjørg á Rógvi***

– Eg eri ættað úr Funningi og eri gift til Vestmannar. Her havi eg onga familju, men havi búð her síðan 1985. Maðurin er Leivur á Rógvi, sum í fleir ár hevur siglt í Grønlandi.

Hon visti tí av góðum grundum ikki, hvørjar møguleikar hon hevði, tá hon læt seg stilla upp, men gjørdist ovfarin og takksom av dyggu undirtøkuni, hon fekk.

– Hetta hevur verið ein lærurík tíð í bygdarráðnum, og tað hevur eisini verið spennandi og avbjóðandi á ovastu rók, nú hesin møguleikin beyðst.

Hon ásannar, at tað hevur verið nógv at seta seg inn í og nógv at takast við, men við góðari og dugnaligari umsiting í kommununi hava tingini lagað seg sum best.

Seinastu árini hevur Bjørg á Rógvi starvast sum sjálvstøðug vinnurekandi, har hon hevur rikið stóra kampingplássið Inni á Fjørð síðan 2012. Hetta er ein serlig søga – ja, ein sólskinssøga – sum vit fara at venda aftur til í aðrari grein.

Nú hon røkir starvið sum borgarstjóri, eru tað onnur, sum taka sær av kampingplássinum.

Stóran part av arbeiðslívinum starvaðist hon sum bankafólk, fleiri ár í Havn og síðan í Vestmanna, og her var hon fram til fyri sjey árum síðan.

Í sínari tíð var hon í skrivstovulæru hjá sakførara, og hon nam sær eisini diplom í journalistikki.

***Tað hevur verið nógv at seta seg inn í og nógv at takast við, men við góðari og dugnaligari umsiting hava tingini lagað seg sum best***

## Vegur og bátahylur

Í Vestmanna er ymiskt í gongd í løtuni, og ætlar tú tær inn í bygdina eftir Niðara Vegi, sært tú skjótt, at her er arbeiði í gongd, har partur av vegnum í løtuni verður breiðkaður.

Meðan arbeitt hevur verið, hevur vegurin onkrar dagar verið stongdur fyri gjøgnumkoyring, samstundis sum ferðslan er víst niðan á Ovara Veg í bygdini.

Niðari Vegur er í støðum ein fløskuhálsur, og tað er ein gomul ætlan hjá kommununi at breiðka vegin, har tað letur seg gera, og nú er so sjøtul settur á ein part av hesum arbeiði.

Bjørg á Rógvi sigur, at eitt annað arbeiði, sum skjótt fer í gongd í Vestmanna, er at tøma bátahylin Inni á Fjørð fyri sand og leyst tilfar, sum kemur oman við ánni og endar í bátahylinum.

– Bátahylurin er ikki tømdur í nógv ár, og nú er so nógvur sandur og leyst tilfar inni í hylinum, at hann í støðum er vorðin alt ov grunnur. Eitt nú kann innasta brúgvin í bátahylinum ikki brúkast, tí her er ov grunt.

Hon vísir á, at nú bátastevna verður í Vestmanna, og brúgvar verða lagdar út til endamálið, hava tey gjørt avtalu við bátastevnunevndina um, at brúgvarnar fyribils vera liggjandi.

– Tá bátastevnan er liðug, verða bátarnir, sum liggja í bátahylinum Inni á Fjørð, lagdir við brúgvarnar hjá bátastevnunevndini. Tá bátahylurin er tómur, verður farið undir at taka leysa tilfarið upp, og metingarnar siga, at talan verður um einar 15.000 rúmmetrar av tilfari.

So, hetta eru ikki smávegis nøgdir, sum tosað verður um.

## Nýggjar bátabrúgvar

Tá arbeiðið at tøma hylin er liðugt, verður gjørt klárt til at leggja nýggjar bátabrúgvar út í hylin.

– Vit hava keypt nýggjar bátabrúgvar, sum eru komnar og liggja klárar á havnalagnum og soleiðis, sum eg havi skilt, fáa vit við nýggju brúgvunum eini 10 bátapláss aftrat í hylinum.

Gomlu brúgvarnar eru ikki brúkligar meira, og berievnini eru vánalig.

– Eg vænti, at arbeiðið at dýpa bátahylin og leggja nýggju brúgvarnar út verður liðugt tíðliga í heyst, og tá fara vit so eisini at taka brúgvarnar hjá bátastevnunevndini uppaftur.

Bjørg á Rógvi sigur, at SEV, sum brúkar vatnið oman fyri Vestmanna, rindar helvtina av tí, sum sjálv dýpingin av bátahylinum kostar.

– Á fíggjarætlanini hjá kommununi fyri 2024 eru tilsamans 9,4 milliónir krónur til íløgur, harav bátahylurin í krónum er hin størsta einstaka verkætlanin.

Hon leggur aftrat, at sjálv dýpingin kostar umleið 2,8 milliónir, sum SEV so rindar helmingin av, og bátabrúgvarnar kosta umleið 3 milliónir krónur.





– Eitt arbeiði, sum vit eisini eru í holt við, er kloakkirnar, og her vanta í løtuni umleið 40 prosent av samlaðu verkætlanini, áðrenn vit hava eina góðkenda spillivatnsskipan fyri alla kommununa, sigur hon.

## Sjey tøk grundstykki

Í Vestmanna eiga tey sjey byggibúgvin gundstykki at vísa fólki á, sum kundu hugsað sær at sett búgv í kommununi.

– Grundstykkini liggja í útstykkingini Uppi á Grótbrúgv, vit rópa. Her vóru upprunaliga 22 grundstykki, byggibúgvin og klár at byggja á.

Borgarstjórin vísir á, at øll grundstykkini hava verið seld, men í løtuni eru sjey grundstykki latin aftur til kommununa.

– Soleiðis hava vit hesi sjey grundstykkini til sølu, sum eru púrasta klár at byggja á. Fólk, sum keypa, skulu bara søkja um byggiloyvi, og tá byggiloyvið er komið, er klárt at byggja.

Hon sigur, at av teimum seldu grundstykkjunum eru eini fimm hús bygd ella standa í gerð.

– Tey sjey grundstykkini, sum eru tøk, verða seld fyri millum 250.000 og 300.000 krónur – alt eftir, hvussu stór grundstykkini er, og fólk eru hjartaliga vælkomin at venda sær til kommununa við møguligum fyrispurningum.

Bjørg á Rógvi sigur, at ein onnur stór verkætlan, sum tey í kommununi eisini arbeiða við, er skúlin í bygdini, sum bæði skal umvælast og dagførast, og her skal eisini takið skiftast á tí eldra partinum av skúlanum, eins og hin eldri parturin eisini skal hava ventilatión.

– Elsti parturin av skúlanum er frá 1952, og hin nýggjasti er frá 1986, og tað er greitt, at her verður neyðugt við stórum íløgum til umvælingar og dagføringar, leggur borgarstjórin aftrat.